# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Jørgin Dahl 50 ár



Mánadagin 4. apríl verður Jørgin Dahl úr Klaksvík 50 ár. Hann er kendur sum slóðbrótandi tónleikari í føroyskum rocktónleiki, og tað sást heilt tíðliga í lívi hansara, at serligur áhugi var fyri tónleikinum.

Jørgin vaks upp hjá ommu og abba sínum – Kallu og Petur Juul Samuelsen á Vágsheygnum. Hann fór í skúla í 1962 og lærdi seinni til timburmann hjá Klaksvíkar Byggivirki.

Men tað varð tónleikurin, sum frá barnaárunum hevði mest at siga fyri hann. Hann plagdi sum smádrongur at lurta eftir ommu síni, tá ið hon sæt við orglið og spældi úr Føroya Fólka Sangbók sunnudagar, og skjótt hevði hann hug at blanda seg upp í. Hann fór sjálvur at spæla, og so skjótt sum hann hevði fingið tamarhald á orglinum fór hann eisini at skriva sín egna tónleik. Fyrst vóru tað smærri stykki – næstan á tann klassiska bógvin – men seinni gjørdist tað veruligur popp- og rocktónleikur, sum allir føroyingar fóru at syngja við til.

Jørgin og vinmenninir høvdu fleiri kjallarabólkar, og útgerðin var ikki altíð tann mest framkomna – at byrja við gjarna blikktrummur, mjólkaspannir og ein einstakur kassagittar. Men tað var nóg gott til at taka 10 oyru fyri at loyva fólki inn til konsert. Seinni gjørdust ljóðførini elektrisk og útikonsertir í havanum hjá ommu hansara komu eisini á skránna.

Sum 15-ára gamal spældi hann fyrstu ferð alment. Tað hendi i Atlantis Bio í Klaksvík. Hann spældi saman við millum annað gekkavertinum Rudolfi Joensen í bólkinum Artic Fox. Umframt sangir hjá Deep Purple, Sweet og øðrum útlendskum bólkum, spældi Artic Fox eisini tónleik hjá tí blaðunga orgulspælaranum.

Fyrst í 70'unum kom Jørgin Dahl í samband við nakrar av tónleikarunum, sum komu at manna Straight Ahead – Archibald Black, Hera Ellingsgaard og Edvard Ziska. Teir spældu til dans í Klaksvík og aðrastaðni í landinum, og í 1974 kom fyrsta singleplátan hjá teimum út. Á plátuni vóru sangirnir Komið øll við og Upp á gólv. Seinni góvu teir eina singleplátu, eina EP-plátu og til seinast ein LP-plátu út. Stutt eftir at tann sonevnda Veðraplátan var komin út í 1978, og populariteturin hjá Straight Ahead var størri enn nakrantíð, valdi bólkurin at gevast at spæla.

Jørgen Dahl fór síðani at spæla við hinum stóra Klaksvíksbólkinum um tað mundið – Hjarnar. Og tey næstu árini vóru nøkur av teimum mest spennandi hjá tí seiglívaða rockbólkinum, sum framvegis er virkin. Teir góvu tónleik út, og í eini tónleikakapping í Radio Luxembourg var tað um reppið, at ein sangur hjá Jørgin Dahl tryggjaði teimum ein plátusáttmála. Sangurin Breaking My Heart gjørdist nummar 2 í stóru kappingini við nógvum hundrað sangum.

Nakað eftir at Hjarnar hevði givið sína LP-plátu, We come for you, út, fór Jørgin Dahl úr bólkinum, og hann fór til Danmarkar at búgva. Har hevur hann búð síðstu 20 árini, og stutt frá tokstøðini á Eysturbrúgv býr hann saman við Gittu.

Jørgin Dahl er framvegis virkin tónleikari – hann bæði spælir og skrivar tónleik – og av og á kann hann upplivast á palli í Føroyum, nú hann aftur er farin at spæla við Hjarnum.

**Eyðun**

## Petur Vilhelm 85 ár

Mánadagin 4. apríl 2005 fyllir PeturVilhelm í Vági, vanliga nevndur Petur Post, 85 ár.

Navnið Petur Post kemur ikki av ongum, Petur arbeiddi á posthúsinum í Vági, frá tí at hann byrjaði at ganga við posti sum 14 ára gamal, til hann legði frá sær sum 70 ára gamal. Tá hevði hann verið avgreiðsluleiðari í mong ár.

Petur er vágbingur, foreldrini vóru: Daniella, ættað úr Porkeri og Tom Vilhelm (Tom á Tjørn), úr Vági.

Umframt at arbeiða á posthúsinum hevði Petur eisini egnan hýruvogn, sum hann koyrdi við í frítíðini. Hann plagdi t.d. at vera bilførari, tá kongavitjan var í Vági, og handaði Fríðrikur IX honum persónliga medalju í hesum sambandi.



Petur var eisini í mong ár virkin í Vágs Tónleikarafelag.

Hann hevur altíð verið íðin VB viðhaldsmaður, og hevur sitið í nevnd í felagnum í mong ár og eisini verið formaður. Í 1975 varð hann kosin heiðurslimur í felagnum. Hann er eisini heiðurslimur í íslendska fótbóltsfelagnum »Reynir« í Sandgerði. VB og Reynir hava fleiri ferðir vitjað hjá hvør øðrum og spælt vinardystir saman. Petur var ein av undangongumonnunum í hesum samstarvi, sum førdi til at Vágur og Sandgerði eru vinarbýir.

Petur giftist við Hjørdis, f. Sumberg, úr Vági. Hon andaðist í 2001, 78 ár gomul. Tey fingu børnini: Tom, sum býr í Grønlandi, Jón sum býr í Vági, og Maluna, sum býr á Tvøroyri. Petur eigur 10 abbabørn og 4 langabbabørn.

Tey sum ynskja at heilsa upp á Petur í samband við føðingardagin eru vælkomin í heimið í Neslíð mánadagin millum kl. 14 og 17.

## Signhild Danielsen 90 ár

Týsdagin 5. apríl 2005 fyllir Signhild Danielsen í Havn 90 ár.

Signhild er ættað av Skála. Foreldrini vóru: Rakul, f. Joensen, ættað av Skælingi, og Palli Rasmussen, sum vanliga varð nevndur Skála-Palli, eftir at tey vóru flutt til Havnar at búgva.

Sum 16 ára gomul kom Signhild til Havnar, har hon hevði húspláss.

Hon giftist við Petur Danielsen, ættaður av Hvítanesi, sum í dag er 91 ára gamal.

Signhild og Petur fingu børnini: Dánjal Pauli, Regin, Jana og Petur. Dánjal Pauli andaðist í november 1994, 57 ára gamal, og Petur andaðist í mai 1995, 46 ár gamal.

Petur tók setiskiparaprógv sum ungur, og sigldi til hann varð 60 ára gamal, tá hann mátti gevast, tí eyguni vór farin at bila. Hann var eisini ein av eigarunum av trolarunum Hvítanes, sum vóru tríggir í tali.

Petur og Signhild búðu á Abbatrøð tey fyrstu árini, til tey fluttu í nýggj hús úti



í Grønlandi. Seinastu trý árini hava tey búð á Eldrasambýlinum Oman Hoydalar í Hoyvík.

Signhild hevur verið ein góður stuðul hjá Peturi, bæði tá hann sigldi, og ikki minst síðan hann bleiv blindur.

Signhild kennir ein hóp av fólki, og er hon sera trúføst. Bæði hon og Petur fylgja væl við í tí sum gongur fyri seg í samfelagnum.

Tey hava eisini verið trúføst í samkomuni í Ebenezer, sum hevur verið teirra andaliga heim.

Signhild og Petur eiga 11 ommu- og abbabørn, og 30 langommu- og langabbabørn.

Føðingardagurin verður hildin í Pálsstovu, og tey sum ynskja at heilsa upp á Signhild eru vælkomin í Mykinesgøtu 7 millum kl. 17-21 hendan dagin.

### Dagurin

**2. apríl. Teodosius**. Kann vera navnið á rómverska keisaranum Teodosiusi Stóra, sum doyði í 395. Men teir halda, at líka skjótt hevur dagurin navn eftir kristnari gentu Teodosiu, sum varð tikin av døgum umleið ár 300. Viðhvørt verður hesin dagurin róptur Teodorius.

*Nikolai Mohr doyði hendan dagin í 1790.*

**3. apríl. Nikaitas**, deyður í 824. Abbati í Grikkalandi. Í fornkirkjuni hildu teir, at 3. apríl var dagurin, tá ið Kristus varð krossfestur.

**4. apríl. Ambrosius**, deyður í 397. Biskupur í Milano, verður nevndur sum ein av kirkjufedrunum.